# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2014

<table>
<tr><td colspan="2">Fundur nr. 10<br>Tíð: 24. november 2014, kl. 19.00<br>Stað: Kommunuskrivstovan</td><td colspan="2">Skrivari: Petry Joensen</td></tr>
<tr><td>Fastir fundardagar:<br>28. januar, 17. februar, 17. mars, 28. apríl, 26. mai, 23. juni, 25. august fl. 8. september, 29. september, 27. oktober, 24. november, 15. desember</td><td colspan="2">Møttir:<br>Allir uttan nevndu, sum hava fráboðað at teimum ikki er møguligt at møta.</td><td>Ikki á fundi:<br>Sirið Stenberg, Poul Augustinussen og Conrad Gaard Joensen, øll fráboðað</td></tr>
</table>

Conrad Gaard Joensen hevur í telduposti dagfestur 24. november 2014 boða frá, at hann ikki kann møta á býráðsfundi, og at næsti maður á listanum Olgar Mortensen møtir í sítt stað.

Einmælt samtykt at taka undir við, at Olgar tekur sæti á hesum býráðsfundi.

**1) Mál nr.: 14/00220 Umfígging av lánum hjá Vágs kommunu**.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá fíggjarnevndini, sum á fundi 17. november viðgjørdi málið viðv. umfígging av lániskuldini hjá Vágs kommunu.

*Inn vóru komin trý tilboð.*
Suðuroyar Sparikassi dagfest 6.11.2014
Eik Banki dagfest 31. oktober 2014 og
BankNordik dagfest 7. november 2014

Fíggjarnevndin mælir býráðnum til at taka av tilboðnum hjá Suðuroyar Sparikassa. Somuleiðis mælir nevndin til at taka lán uppá 25 mió. og at kommunan hevur ein fastan avdráttarprofil av láninum.

**Avgerð:**
Eydis Kjærbo var ikki við í viðgerðini, metti seg ógegnigan.
Einmælt samtykt.
BankNordik lánið verður sostatt goldið út, í samband við umfíggingina.

**2) Mál nr.: 14/00197 Fíggjarætlan fyri Vágs kommunu 2015, Seinna uppskot.**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá fíggjarnevndini sum á fundi 18. november hevur samtykt at leggja seinna uppskot til fíggjarætlan fyri Vágs kommunu 2015 fyri býráðið.

Munandi broytingar eri gjørdar í mun til fyrra uppskotið.
Seinna uppskot vísir inntøkur uppá 37.698 mió, útreiðslur uppá 27.503 mió og íløgur fyri 4.630 mió.. eitt RLÚ uppá 5.565 mió. Niðurgjalda av skuld er 2.300 mió.
Skotið verður somuleiðis upp at lækka skattaprosentið frá 23,15% niður í 22,95%, barnafrádrátturin verður óbroyttur 4.000,00 kr..

**Avgerð:**
Skotið var upp at flyta 80.000,00 kr. frá íløgum heilsumiðstøðini til rakstur undir Sosialu nevnd.
Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til FÆ2015 við nevndu broyting.

**3) Mál nr.: 14/00237 Umsókn um stuðul til grundleigu – Páls Høll** .

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá fíggjarnevndini, sum á fundi 17. november viðgjørdi tilmæli frá Mentunarnevndini um at játta Sjálvsognarstovninum Páls Høll stuðul til grundleigu í 2014 uppá 98.000,00 kr..
Fíggjarnevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá MN og leggja málið fyri býráðið.

**Avgerð:**
Dennis var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan.
Eydis Kjærbo, varaborgarstjóri leiddi fundin í hesum málið.
Einmælt samtykt.

**4) Mál nr.: 14/00028 Leigusáttmáli millum Vágs kommunu og Páls Høll um nýtslurætt**.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá fíggjarnevndini, sum á fundi 17. november viðgjørdi leigusáttmála millum Vágs kommunu og Sjálvsognarstovnin Páls Høll um nýtsluræ ttin av svimjihylinum.
Í samband við rest fígging til Sjálvsognarstovnin ynskir BankNordik at sáttmálin gongur yvir eitt ásett áramál.

Fíggjarnevndin samtykt at dagføra sáttmálan samsvarandi teldupost frá borgarstjóranum 17. november 2014. Og at leggja málið fyri býráðið á komandi fundi.

**Avgerð:**
Dennis var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan.
Eydis Kjærbo, varaborgarstjóri leiddi fundin í hesum málið.
Einmælt samtykt.

Undirskriva:

## 5) Mál nr.: 14/00261 Keyp av ogn til víðkan av Kirkjugarði

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilboð frá eigarum av matr. nr. 622b dagfest 30. september 2014.
Vágs kommuna skal í eina tilgongd at víðka verandi kirkjugarð inni í Líðini. Fyrsta stig er at ogna sær lendi og hava eigarar av matr. nr. 622b játta at fara í eina tilgongd at selja kommununi teir 4.264 fermetrarnar sum liggja uppat kirkjugarðinum.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at keypa ognina.

## 6) Mál nr.: 14/00233 Eykajáttan til Suðuroyar Barnaverndartænastu 2014

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá fíggjarnevndini sum á fundi 17. november viðgjørdi tilmæli frá Sosialu nevnd um at játta eina eykajáttan til Suðuroyar Barnaverndartænastur fyri restina av 2014 uppá 400 tús. kr..

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at taka undir við tilmælinum hjá Sosialu nevnd, og beina málið í býráðið.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

## 7) Mál nr.: 14/00238 Leigusáttmáli uppá neystagrund matr. nr. 610a og 635

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá fíggjarnevndini sum á fundi 17. november viðgjørdi uppskot til leigusáttmála millum Vágs kommunu og Arna Midjord fyri part av matr. nr. 610a og 635, íalt 50 $m^2$ til støddar. Havnanevndin hevur á fundi 11. november góðkent uppskotið. Fíggjarnevndin samtykti einmælt at taka undir við hesum, málið verður lagt fyri býráðið.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

Undirskriva:

**8) Mál nr.: 14/00256 Broytingar av gjøldum á Vágs Havn**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá fíggjarnevndini sum á fundi 17. november viðgjørdi málið viðv. broyting av gjøldum á Vágs Havn.

Skotið var upp at frá 1. desember 2014 verður hetta ískoytið gjørt til verandi skipan av gjøldum á Vágs Havn.

Fyri innihald í bingjum o.t., sum verða settar á Vágs Havn til áfyllingar av vørum framleiddar á og við Vágs Havn og avskipaðar av Vágs Havn eftir vegakervinum, verður áløgd ein leiga, sum er ásett at verða 10,75 kr. pr. tons.
Undantikið hesum eru bingjur o.t., har talan er um fisk frá skipum, sum landa við Vágs Havn, har fiskurin verður førdur av Vágs Havn í trailara til virkir aðrastaðni í landinum.
Bingjur o.t., sum verða fyltar á Vágs Havn og avskipaðar umvegis kei-kantin í Vági, verða ikki fevndar av hesari skipan.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at taka undir við hesum og leggja málið fyri býráðið.

**Avgerð:**
5 atkvøddi fyri at gera nevnda ískoytið i verandi skipan av gjøldum við Vágs Havn. Heri Hjelm og Olgar Mortensen atkvøddi ímóti.

**9) Mál nr.: 14/00257 Skipan av Eldrabústaðum í Suðuroynni eftir 1. januar 2015**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram notat dagfest 10. november 2014 frá SPEKT, viðv. kommunalum samstarvi um heimatænastu, eldrarøkt v.m. í Suðuroynni.

Fíggjarnevndin var kunnað um hetta notat á fundi 17. november. Nevndin samtykti einmælt at leggur málið fyri býráðið. Fíggjarnevndin er positiv sinnað bæði fyri at selja ognirnar inn í samstarvið, eisini at gera eina leiguavtalu við Suðuroyar Bú- og heimatænastu um ognirnar.

**Avgerð:**
Býráðið kunnað. Tá stýrið er komin til eina semju verður málið lagt aftur fyri býráðið til støðutakan.

Undirskriva: